


Nr. 1 4. januar 2026 86. árg.

# Bíblian hjá mammu

Tá ið eg fór úr skúlanum, legði mamma sína egnu Bíbliu niður í kuffertið hjá mær. Á fremsta blaði hevði hon skrivað: „Les hvønn morgun og hvørt kvøld eitt stykki í hesi bók, mítt góða barn, og mátti Gud lagt sína signing hartil.“ Árið eftir doyði hon.

25 ár seinni var eg einaferð á ferð og fór inn á eitt gistingarhús, sum lá við eina lítla tokstøð. Har vóru mong ferðafólk, og eftir nátturðan kom ein ferðamaður, sum hevði verið darvaður av onkrum, og bað um innivist. Teir vístu honum so á kamar mítt, har hann kundi gista um náttina. Av tí at tað longu var so seint, umbar eg meg og breyt samrøðu okkara av og tók Bíbliu mína – ta gomlu hjá mammu mínari – fram og las ein kapittul. Síðani legði eg meg, men læt Bíbliuna verða liggjandi á borðinum. Tá ið eg vaknaði morgunin eftir, var hin ferðamaðurin longu farin við einum toki, sum fór so tíðliga. –

Mong ár seinni var eg limur í einum kirkjuliði í New York. Vit høvdu samtalumøti eina ferð um vikuna. Hesi møti høvdu eina serliga atdráttarmegi á fremmandafólk, og vóru altíð nógv fólk á hesum møtum. Eitt kvøldið helt prestur sum vant eina stutta talu sum innleidning til samrøðuna. Evnið hjá honum var: „Eitt og hvørt talað ella skrivað orð hevur annaðhvørt eina góða ella eina

ringa ávirkan fyri ævinleikan.“ Eftir at fleiri í kirkjuliðinum høvdu sagt okkurt um hetta, var tað ein maður, sum fór á føtur og bað um loyvi at siga frá egnu royndum sínum í so máta. Hann segði so frá hesum:

„Fyri mongum árum síðani, tá ið eg enn ferðaðist um, mátti eg einaferð hava kamar saman við einum øðrum ferðamanni á einum gistingarhúsi við eina lítla tokstøð. Mín ferðafelagi las ein kapittul í Bíbliu síni, áðrenn hann legði seg at sova, tí sum hann segði, hann vildi gera, sum mamma hansara sála, hevði viljað. Av tí at eg ikki vildi sova, las eg eisini ein kapittul, av tí at eg var forvitin eftir at fáa Bíbliuna upp í hondina og fáa at vita navnið á hinum ferðamanninum. – Fremst í Bíbliuni stóð umbønin hjá mammuni til hansara um hvønn morgun og hvørt kvøld at lesa eitt stykki.

Í mong ár hevði eg ikki lisið í Bíbliuni, men tá ið eg blaðaði gjøgnum hesa Bíbliuna, fann eg eitt bíbliuvers fyri og annað eftir undirstrikað, og tí las eg við vaksandi áhuga, til eg bilsin sá, at náttin var farin, og tíð var hjá mær at fara oman á tokstøðina. Síðani ta náttina havi eg verið bíbliulesari. Tað var fylgjan av teimum fáu orðunum, sum ein gudrøkin mamma hevði skrivað til sín unga son.“

Tá ið hann var liðugur við frágreiðing sína, reistist eg og segði, at tað var eg, sum hevði kamar saman við honum, og saman við honum kundu vit takka Gudi, at vit nú báðir gingu á sama vegi.

**„Himmelveien“ – Effie Campbell** umsetti.

# Harrans bøn

Valentin Karlsen, pápi Ludvig, hoyrdi til tað ferðandi fólkið, eisini kallað tatarar, romani-fólkið ella sigoynarar. Tá ið hann bleiv umvendur, virkaði hann sum

evangelistur, serliga í tí stóru vekingini millum fólk sítt í 70– og 80– árunum í Noregi.

Hann var ein bønarkempa og hevði fastar bønarstundir hvønn dag, alt lív sítt.

Hann bað fyri systkjum og hálvsystkjum sínum. Bøn fyri ófrelstum er ein bøn eftir Guds vilja, og tí trúði hann fult og fast, at øll í ætt hansara fóru at verða frelst, tí Jesus segði: „So verði tykkum eftir trúgv tykkara!“ Matt. 9,29

Morgunbønirnar vóru á knæ saman við konuni ella við vinum, sum vóru komin á vitjan. Sterkar bønir frá smáum menniskjum stigu upp til Guds frá stólunum, har tey lógu við boygdum høvdi. Tey byrjaðu altíð við at takka fyri hvønn nýggjan dag, uttan mun til, um tað virkaði tungt við sjúku.

So bað hann fyri børnum og abbabørnum og restini av familjuni. Navn eftir navn bleiv lagt fram fyri Gud í bøn.

Morgunbønin hjá Valla var nágreinilig og tók sína tíð hvønn einasta dag.

So kom eitt rað av bønarevnum í fastari raðfylgju eftir tørni. Hann hevði sanniliga okkurt at læra okkum, eftirkomarar. At enda ljóðaði Harrans bøn gjøgnum rúmið. Hann helt, at Faðirvár altíð var so vakurt, og hann segði ofta, at hann var serliga glaður fyri ta bønina, sum Jesus sjálvur gav okkum. – Tað er ein bøn, sum ger øll kristin um allan heim til systkin. Vit biðja um breyð til okkum øll. Vit biðja um syndanna fyri geving fyri okkum og øll onnur. Vit biðja hvør fyri øðrum at sleppa undan freistingum. Faðirvár er í grundini ein forbøn, segði Valle og legði afturat, at Jesus áhaldandi gongur í forbøn fyri okkum hjá Gudi í Himli.

**Vera Karlsen, abbadóttir Valla.**

**Effie Campbell** umsetti.

# Eitt langt, lukkuligt hjúnalag

George og Mary Lou hátíðarhildu sítt gullbrúdleyp, og í tí sambandi spurdi ein blaðmaður George: „Hava tygum uppskriftina upp á eitt langt, lukkuligt hjúnalag?“ George segði, at eftir brúdleypið hevði verfaðirin givið honum ein pakka. Í pakkanum var eitt gullur, sum George enn brúkti. Hann vísti blaðmanninum tað. Tvørtur um glasið á urinum, sum hann hugdi eftir mangar ferðir dagliga, vóru inngrivin hesi orð: „Sig okkurt pent við Mary Lou.“ Hasum urinum munnu vit øll hava brúk fyri. e.c. ums.

# Hungur eftir Guds orði

Ein prædikumaður tosaði einaferð um at hava góðan matarlyst. Hann gekk út frá skriftorðinum: „Sæl eru tey, ið hungra og tysta eftir rættvísi, tí at tey skulu verða mettað.“ Matt. 5,6. „Um vit ikki hava góðan matarlyst, tá ið vit skulu eta,“ segði hann, „so er okkurt galið. Annaðhvørt eru vit sjúk, ella hava vit etið okkurt í ótíð, annars høvdu vit kunnað etið.“ Hann segði ógvuliga livandi frá, hvussu hann einaferð arbeiddi saman við einum manni, sum hevði tann óvanan at eta ís á heimvegnum um kvøldarnar. Eina tíð fylgdist hann við hesum vinmanninum og át so eisini sjálvur ís og tílíkt á vegnum heim.

Tá ið hann so settist til borðs heima, var hann als ikki svangur, skeldaði um matin og orkaði einki at eta. Kona hansara spurdi hann einaferð, hví hann brádliga einki át, og tá ið hon hoyrdi orsøkina, segði hon, at um hann bar seg soleiðis at, fór hon ikki longur at gera mat til hansara.

Tað hjálpti – men hvussu mikið meira mugu vit so vera varin við, hvat ið vit gera áðrenn møtini. Fylla vit okkara tankar við hesum heimsins tingum, so kunnu vit lætt missa hugin til Guds orð og í staðin finna brek við

øllum.

Men koma vit á møti við huga til Guds orð, til sang og vitnisburð, tá vil Harrin metta okkara sálir, so vit kunnu ganga fram á hansara vegi og eisini verða eitt fyridømi fyri onnur. **Effie Campbell** umsetti.

# Eitt beinrakið svar

Ein kristin drongur varð ofta argaður av vinmonnum sínum, av tí at hann var á møti hvønn sunnudag. „Tað er ikki neyðugt,“ søgdu teir við hann, „tey siga jú tað sama viku eftir viku.“

„Tað er satt, men sjálvt um eg veit, hvussu breyð smakkar, má eg eta tað hvønn dag fyri at halda likam mítt á lívi. Guds orð er breyðið hjá sálini, tað má eg eisini eta hvønn dag, um eg vil halda sál mína á lívi.“

Etur tú Guds breyð hvønn dag?

**Effie Campbell** umsetti.

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| |
|---|
| 4. jan. **Tekstur:** 2. Mós. 19,1–25 **Bíbliuorð:** 2. Mós. 19,5 |
| 11. jan. **Tekstur:** 2. Mós. 20,1–11 **Bíbliuorð:** Mark. 12,30 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




Nr. 2 **18. januar 2026** 86. árg.

# Einar opnar dyr

***„Sí, eg havi latið dyr standa opnar fyri tær, sum eingin er mentur at lata aftur; tí at tú hevur lítlan mátt, og kortini hevur tú varðveitt orð mítt og ikki avnoktað navn mítt.“ Opb. 3,8.***

Kanska skalt tú taka eina týðandi avgerð, men tú veitst ikki rættiliga, hvat ið tú skalt gera? Ella kanska heldur tú, at allar dyr eru læstar, og tú veitst ikki hvønn veg, ið tú skalt fara? Fall ikki í fátt! Gud kann lata einar dyr upp fyri tær, sum eingin kann lata aftur. Hoyr hesi undurfullu orðini, sum Jesus sigur í Bíbliuni. Hann sigur tey við kirkjuliðið í Filadelfia. Hesi orð kanst tú eisini taka til tín sum tíni:

„Sí, eg havi latið dyr standa opnar fyri tær, sum eingin er mentur at lata aftur; tí at tú hevur lítlan mátt, og kortini hevur tú varðveitt orð mítt og ikki avnoktað navn mítt.“ Opb. 3,8

Fyri tað fyrsta vísur henda tekst, at Gud kann lata einar dyr upp fyri tær, tá ið tørvur er á tí. Um Hann ger tað, so kann einki menniskja lata tær aftur. Tekur tú Gud við í lívi tínum og í tínum avgerðum (t.e. tú biður

um Hansara hjálp og ert villigur at gera tað, Hann sigur), so kann Hann lata møguleikar upp fyri tær, har tað í dag eingir møguleikar eru.

Fyri tað næsta sigur Jesus, at tú ikki skalt falla í fátt, sjálvt um tú heldur, at tú hevur lítlan mátt. Tað er nevniliga so, at tað veldst ikki um tín mátt, tá ið Gud er uppií. Guds kraft er størri enn tín veikleiki.

Fyri tað triðja so er tín lutur at halda fast við tey orð, Jesus hevur talað og ikki at avnokta Hann. Tað vil siga, at tú kanst lesa um tað, Jesus sigur í evangeliunum í Nýggja Testamentinum

og fylgja Jesusi, tá ið tú gert tað, Hann sigur. Samstundis kanst tú við frímóði halda fast í, at tú trýrt á Jesus og fylgir Honum. ***„Præsten og Psykologen“ – Effie Campbell*** umsetti.

# Hjúnalagið

Ein av prestum okkara talaði uppi í K.F.U.K. Hann greiddi millum annað frá einari smágentu, sum æt Ingrid. Tann dagin, hon fylti 10 ár, rópti pápin hana inn til sín og segði: „Nú ert tú tíggju ár, og frá hesum degi skalt tú sjálv byrja at biðja dagliga Harran vísa tær, hvør hin rætti hjúnafelagin er fyri teg, tá ið tann tíðin kemur.“

Ingrid vaks upp, giftist og fekk eitt lukkuligt lív. Hon og maður hennara vóru trúboðarar og tæntu Harranum í mong ár í útlondum. Tey hava eisini skrivað bøkur.

Tá ið eg hoyrdi hetta, kom eg at minnast til, hvat ið trú boðarin Anne-Lise Madsen skrivar um tað sama í bók síni „Kvinde, hvorfor græder du?“ Í 9. kap. skrivar hon m.a.:

Í Orðtøkunum 31 fáa vit eina ógvuliga vakra mynd av einari dugnaligari konu. Tað er móðir Lemuels, sum her undirvísir soni sínum og lærir hann, hvussu hann skal fáa eitt eydnuríkt lív. Frá 10. versi sigur hon soni sínum,

hvussu stóran týdning tað hevur, at hann fær hin rætta hjúnafelagan.

Eg má viðganga, at eg havi biðið fyri børnum okkara, heilt frá tí tey vóru pinkubørn, at tey máttu fáa hin rætta hjúnafelagan. Vit hava tosað opið við tey heilt frá barnaárunum, hvussu stóran týdning tað hevur, hvønn tú velur at fylgjast við gjøgnum lívið. Tað týdningarmesta er at verða føddur av nýggjum og liva við Jesusi. Men tað, sum síðani er týdningarmest, er at velja hin rætta hjúnafelagan. Um vit eru líkasæl her, kunnu vit oyðileggja alt lív okkara. Mamma segði einaferð við meg: „Tað er betri, Anne-Lise, at tú livir einsamøll alt lív títt, enn at tú fært ein mann, sum tú ikki kanst liva í samlag við!" Øll trý børn okkara tæna Harranum saman við hjúnafelaga sínum. Tað er stórt og nógv at siga takk fyri.

Anne-Lise hevur rætt. Tey munnu vera mong, sum hava grátið síni søltu tár, tí hjúnalagið fór í sor. Ov seint sóu tey, at tey høvdu verið ov sjálvráðin og ikki spurt Harran um ráð. Eitt av nøvnum Harrans er „ráðgevi" (Jes. 9,6). Hann, sum hevur skapt okkum, veit, hvør ið best hóskar saman við okkum, eins og tveir brikkar, sum liggja saman lið um lið í einum puslispæli. Børnini líða eisini nógv undir tí, tá ið hjúnalagið skrædnar. Í 50-unum varð ein pláta nógv spæld, har eitt ørindi ljóðaði soleiðis: Barnets lille verden er bygget kun på sand, synker den i grus, når han synger sådan: Kom hjem, lille far, mit tog er gået itu, ingen kan hjælpe mig med det mere nu, hvor er her dog trist, her hjemme hvor vi bor, og tænk dig, om natten da græder min mor.

**Effie Campbell.**

## Ketil við køldum vatni

Fyri árum síðani var eitt føroyskt ferðalag í Bangladesj. Tey komu í prát við fólkið á staðnum, og tosið datt niður á hjúna lagið. Onkur føroyingur spurdi eina kvinnu, um hon ikki helt tað vera púra burturvið nú á døgum, at foreldrini skuldu velja henni mannin, hon skuldi giftast við. Men tað helt hon ikki. „Tit velja sjálv. Í fyrstuni er kærleiki tykkara so heitur, at hann brennir alt av, og minst helvtin av hjúnaløgum tykkara fer í sor. Tit valdu sjálv – illa var valt – tit kunnu ikki brigsla nøkrum fyri hetta valið. Tykkara máti hevur spælt fallitt!

Nei, kærleiki merkir trúfesti og álit, meir enn romantikkur og kenslur. Okkara hjúnalag er at sammeta við ein ketil við køldum vatni, sum verður settur útá og spakuliga hitaður upp. Kærleikin hjá okkum kemur so líðandi gjøgnum samlívið, og hann varir allar ævir.“

***Effie Campbell.***

# H. C. Andersen og kongur

H. C. Andersen var einaferð boðin til døgurða hjá kongi. Har varð borðreitt við fínum víni; men Andersen bað tænaran skeinkja sær vatn.

Kongur sá tað, og tá ið hann vildi skála við yrkjaranum, segði hann: „Drekkur tú vatn, tá ið tú skálar við kongi tínum?“ Men Andersen hevði eitt svar til reiðar: „Tá ið eg skáli við kongi mínum, er vatn hin besti, klárasti og mest kongaligi drykkur.“

Kongur visti einki at svara. Kanska viðgekk hann fyri sær sjálvum, at ein reinari og meira heilsuberandi drykkur enn vatn finst ikki.

***„Kirkeklokken“. – Effie Campbell*** umsetti.

# Okkara vaktarhald

Fyri mongum árum síðani vóru tað fleiri, sum vistu djúpt í hjarta sínum: Hann ER her – tað er NÚ!

Jóhannes doyparin visti tað longu í móðurlívi, tá ið Maria kom at vitja. Maria bar eisini barn undir belti. Jóhannes **visti** – Jóhannes **kendi** Hann **aftur** – og Jóhannes, sum burður í móðurlívi, hoppaði av gleði og spældi í móðurlívi.

Hin gamli Símeon, sum plagdi at koma í Templið, **kendi** Guds Frelsu, Jeshua, **aftur**, tá ið eitt átta dagar gamalt pinkubarn varð borið inn í Templið at umskerast. Og hann **visti djúpt inni í gudrøkna hjarta** sínum, at Hann ER her nú!

Eg møðist ongantíð av at lesa um øll hesi fólkini, sum vóru uttan um Jesus – sum **kendu** Hann **aftur** – bæði á jólum, páskum og annars.

Nú er tað OKKARA VAKTARHALD.

**Um fáar dagar fara vit inn í eitt nýtt ár – og hvør einasti av teimum døgunum liggur í hondunum á tíðarinnar Kongi. EINKI hendir, fyrr enn tíðin er komin!**

**Tí vil eg savna meg um GUDS ORÐ og um DAGIN, sum vit hava enn við teimum mongu møguleikum at náa menn iskju. Neyðin er stór.**

**Lívið snýr seg ikki um at bíða, til stormurin makar vindin – tað snýr seg um at læra at dansa í regninum!** Góð og signað jól – og má Harrin vera við tí einstaka tykk ara, tá ið tit stíga um gáttina inn í nýggja árið!

**Effie Campbell** umsetti.

Hava vit fingið bønarsvar, mugu vit senda kvittanina aftur til avsendaran, til himmals, at vit hava móttikið svarið. Vit mugu senda tøkkina upp til Guds. **e.c.** ums.

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í

útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| |
|---|
| 18. jan. **Tekstur:** 2. Mós. 20,11–17 **Bíbliuorð:** Mark. 12,31 |
| 25. jan. **Tekstur:** 2. Mós. 12,37 + 40; 13, 21-22; 14, **Bíbliuorð:** 2. Mós. 14,13b |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74